# Magnus Heinason - Túrfrágreiðing
# Yvirlitstrolingar. Túrur nr. 2006
# Tíðarskeið 04/03-18/03-2019

---

**Fólk frá HAV:** Poul J. Vestergaard, Regin Kristiansen, Jákup P. Dam (Durita Sørensen) og Fróði B. Skúvadal

**Ábyrgd:** Fróði B. Skúvadal, ið er toktleiðari.

**Endamál:** Hetta var tann seinni túrurin av yvirlitstrolingunum á vári í ár á føroyska landgrunninum. Høvuðsendamálið við túrinum er at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Umframt skal vekt, tal og longdarbýti skrásetast fyri øll fiskasløg, ið verða veidd. Eisini skulu magakanningar gerast av toski, hýsu og upsa.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinhamns lemmar. Breitlar 60 og 120 m. Starmon-mini og Starmon-TD temperaturmátarar, sum verða settir á trollemmarnar.

**Kanningarøki:** Trolstøðirnar til yvirlitstrolingarnar á vári eru lagdar kring allan landgrunnin grynri enn 500 m. Tað eru 100 støðir íalt, ið skulu takast tilsamans á báðum túrunum um várið, t.e. á hesum túrinum (2006) og fyrra túri (2004), sí mynd 1, men bert 91 støðir tilsamans vóru tiknar í ár.




**Mynd 1 – Yvirlit yvir strata (bláir kassar í kortinum til vinstru) og støðir (reyðir sirklar á kortinum til høgru).**

## Aðrar uppgávur

Tað var nebbasild í trolinum í einum háli, eins og í einum toskamaga, ein prøvi heintaður frá dekkinum bleiv frystur.
Høgguslokkur bleiv frystur til agn.
12 Genetikkprøvar (fjarðaklipp) blivu tiknar av toski á gytingarøkjunum, á Mýlingsgrunninum.

**Um túrin:** Vit fóru av Havnini fríggjadagin 06.03 á middegi. Seinkingin stóðst av tí, at høvuðsradarin var í ólagi og mátti umvælast. Tá ið umvælingin var liðug, hildu vit út í Vágahavið, har ið tær fyrstu støðirnar vórðu tiknar. Síðani fóru vit vesturum og tóku tær støðirnar, sum vóru eftir har. Hesa vikuna gekk sum heild væl og tiknar vóru 24 støðir, í høvuðsheitum vestanfyri og norðanfyri. Komu á Havnina týskvøldið 10.03 kl. 21.30 at landað og skrifta fólk. Mikudagin 12.03 fóru vit avstað aftur og hildu beint út á Sandoyarbankan og tóku tær støðirnar, sum liggja har. Fóru síðani suður á Munkagrunnin. Lógu bakk ein hálvan dag og tóku síðani tær støðirnar, sum vit náddu. Fóru síðani vesturum og tóku nakrar støðir, sum lógu eftir vestanfyri, soleiðis at øll strata vóru dekkað. Hetta var 15.03. Dagin eftir var ódnarveður og vit lógu bakk. Avgjørt varð um middagsleitið at sigla inn, av tí at veðurlíkindini vóru vánalig, eisini dagin eftir. Tilsamans hesar tvær vikurnar vórðu tiknar 42 støðir. Eftir lógu 13 støðir spjaddar á landgrunninum. Á túri 2009 vórðu fýra støðir, sum lógu eftir vestan fyri Suðuroy og á Munkagrunninum tiknar, og tískil eru 9 støðir ikki tiknar á yvirlitstrolingini í vár.

**Nær verða prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var rættaður 30. marts. Ynskiligt er, at nytrurnar skulu vera lisnar og alt data løgd í databasu 30. Juni.

**Fyribils úrslit:** Nytrur fyri túrarnar 2004, 2006 og 2009 og kannaðir magar fyri hendan túrin síggjast í Talvu 1.

**Talva 1** Yvirlit yvir magar tiknir á túri 2006 og nytrur tilsamans tiknar á yvirlitstrolingunum í 2020 (túri 2004, 2006 og 2009).

| | Toskur | Hýsa | Upsi | Annað |
|---|---|---|---|---|
| **Nytrur** | 939 | 987 | 945 | 267 |
| **Magar** | 126 | 132 | 79 | 31 |

Annað í talvuni omanfyri er longa, blálonga, brosma og gulllaksur.
Í kannaðu magunum var bert ein nebbasild funnin. Nógvir magar vóru tómir.

Annars var nakað av krabbadýrum og hvítingsbróðri í toskamagunum. Niðanfyri (Talva 2) síggjast nøgdirnar fingnar á túri 2006, eins og konditiónsfaktorurin fyri útvald fiskasløg. Sigast kann at toskur og hýsa sum heild høvdu lágan konditiónsfaktor fyri árstíðina.

**Talva 2.** Nøgdir fingnar á túri 2006 og konditiónsfaktorar.

| Slag | Vekt (kg) | Konditiónsfaktor |
|---|---|---|
| Toskur | 3952.011 | 0.976 |
| Hýsa | 19963 | 0.910 |
| Brosma | 86.718 | 1.067 |
| Longa | 930.078 | |
| Upsi | 3494.602 | |
| Hvítingur | 1299.462 | |

| | |
|---|---|
| Hvítingsbróðir | 252.773 |
| Svartkjaftur | 101.622 |
| Tunga | 223.72 |
| Reyðsprøka | 264.79 |
| Sild | 0.643 |
| Nebbasild | 0.004 |
| Lodna | 0.02 |
| Rognkelsi | 137.791 |
| Jákupsskel | 9.32 |
| Havtaska | 188.595 |
| Steinbítur | 16.99 |
| Blálonga | 141.205 |
| Lýsingur | 5.95 |
| Agnhøgguslokkur | 16.079 |
| Sandsprøka | 129.218 |
| Lálla | 0.719 |
| Loligo | 21.44 |
| Gulllaksur | 208.659 |
| Lítli kongafiskur | 1418.386 |
| Trant kongafiskur | 35.865 |
| Stóri kongafiskur | 408.245 |
| Silvur murtur | 75.544 |
| Kjaftsvarti hávur | 25.311 |
| Lýrur | 14.72 |
| Kjaftsvarti kongafiskur | 1.979 |
| Knurrhani | 5.694 |
| Murrikrutt | 0.065 |
| Hvalspýggj | 0.69 |
| Agngágga | 1.846 |
| Gágga (deyð) | 0.797 |
| Skrambul | 4.614 |
| Skaddur fiskur | 1.699 |
| Porifera | 4.414 |
| Echinidae (Igulker) | 13.034 |
| Asteriidaea (krossfiskar) | 21.882 |
| Solasteridae | 3.86 |
| Holothuridea | 0.697 |
| Trøllakrabbi | 2.573 |
| Gággukrabbi | 0.842 |
| **Tilsamans** | 33488.17 |

Eftir túr 2006 vórðu 4 støðir tiknar aftrat á føroyska landgrunninum og skrásettar undir túrnummari 2009. Niðanfyri eru samlaðu úrslitini fyri yvirlitstrolingarnar á føroyska landgrunninum vístar (túrur 2004, 2006 og 2009, tilsamans 91 støðir).

Nøgdin av toski á føroyska landgrunninum í februar-mars 2020 minkaði nógv í mun til í fjør. Hetta komst møguliga av, at toskurin var seinur á veg til gýting og hevði ikki savnað seg á gýtingarøkjunum. Toskurin var rak í mun til onnur ár og komst hetta møguliga av, at lítið var til av nebbasild og hvítingsbróðri, sum er týdningarmikil føði hjá toski. Nógv var til av hýsu, longu, hvítingi, tungu og havtasku. Lítið var til av kalva, trantkongafiski og stóra kongafiski.







LONGA
KG per troltíma
30
25
20
15
10
5
0
1980
1990
2000
2010
2020
2030


UPSI
KG per troltíma
600
500
400
300
200
100
0
1980
1990
2000
2010
2020
2030


HVÍTINGUR
KG per troltíma
60
50
40
30
20
10
0
1980
1990
2000
2010
2020
2030


HVÍTINGSBRÓÐIR
KG per troltíma
140
120
100
80
60
40
20
0
1980
1990
2000
2010
2020
2030


SVARTKJAFTUR
KG per troltíma
70
60
50
40
30
20
10
0
1980
1990
2000
2010
2020
2030


KALVI
KG per troltíma
6
5
4
3
2
1
0
1980
1990
2000
2010
2020
2030


TUNGA
KG per troltíma
8
7
6
5
4
3
2
1
0
1980
1990
2000
2010
2020
2030


REYÐSPRØKA
KG per troltíma
10
9
8
7
6
5
4
3
2
1
0
1980
1990
2000
2010
2020
2030


HAVTASKA
KG per troltíma
4
3.5
3
2.5
2
1.5
1
0.5
0
1980
1990
2000
2010
2020
2030


BLÁLONGA
KG per troltíma
8
7
6
5
4
3
2
1
0
1980
1990
2000
2010
2020
2030


GULLAKSUR
KG per troltíma
250
200
150
100
50
0
1980
1990
2000
2010
2020
2030


TRANTKONGAFISKUR
KG per troltíma
70
60
50
40
30
20
10
0
1980
1990
2000
2010
2020
2030




01-04-2020 Fróði Skúvadal og Petur Steingrund